# Gjáargarður væl vitjaður

**Vallarheimið Gjáargarður við Gjógv verður væl vitjað. Serliga eru tað fólk, ið eru á veg til og úr Íslandi, sum koma framvið um summarið, meðan føroyingar mest brúka garðin tann partin av árinum, Norrøna ikki siglir, sigur dagligi leiðarin**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*




*Gjáargarður er vallaraheim á støði við tey frægastu úti í heimi. Her er alt, sum kravt verður av einum slíkum staði*
*Mynd: Edvard Joensen*

**við Gjógv:** Tey koma mestum allastaðni úr Europa at vitja Gjáargarð. Og eisini føroyingar eru farnir at brúka garðin í rímilaga stóran mun. Bæði sum vanlig ferðafólk, men í størri mun til skeiðvirksemi og slíkt, sum virki og fyritøkur standa fyri.

Tað er farið at kennast úr landnyrðinginum, tá vit koma oman til Gjáar. Tað standa nakrir bilar í túninum uttan fyri stóra bygningin innast í bygdini. Eisini eru fleiri tjøld at síggja á vøllinum omanfyri.

Flaggið hongur í stongini og veit ikki rættiliga, hvat tað skal gera av sær. Hevur ongan hug soleiðis at breiða seg út. Til tess er lotið ov lítið. Melur einar tvær ferðrir í kring og verður so hangandi har rundan um stongina. Eitt sindur vátt er tað helst vorðið, tí hongur tað so deytt.

Eisini tey, sum liggja í tjøldunum omanfyri, eru farin at gera seg út til regn, er líkt til. Taka saman slíkt, sum stendur fyri tjalddurunum, og bera inn gjøgnum einar dyr í høvuðsbygninginum. Fleiri savnast og fara inn.

Hugt verður innar, og tá sæst, at hetta er matsalur, tey sita í. Ein stórur, væl útgjørdur køkur, sum vallaraheimið hevur til gestirnar at matgera og eta í.

Jú, tað letur til, at her er vallaraheim við støði, sum vit til einahvørja tíð kunnu ver tjent við at bjóða fólki.

Hyggi at bilunum, sum standa í túninum. Ein føroyskur er, sæst beinanveg á nummarspjaldrinum. Men so eru tey eisini sera ymist, spjøldrini, hóast fleiri teirra hava hetta bláa ES merkið við gulu stjørnunum og og so einum eyðkennisbókstavi, sum vísir, hvørjum landi bilurin er skrásettur í.

Har eru bæði danir og spaniólar. Týskararnir eru sjálvandi eisini, og onkur eysturríkari. Ein íslendskur stendur har við síðuna av Sosialbilinum, og so sanniliga um ikki eisini ein bilur við polskari nummarplátu rullar inn í túnið. Jú, her er altjóða dámur á parkeringsplássinum, ella rundan um, tí pláss er ikki fyri øllum. Teir standa fram við vegnum inn í Dal.

## Opið um summarið

Gjáargarður hevur opið sum vallarheim um summarið, greiðir dagligi leiðarin, Lis Jørgensen, frá, meðan vit sita í hugnaliga salinum uppi í móttøkuni og fáa okkum kaffi og pannikøkur, sum líkasum er vorðið eyðkenni hjá Gjáargarði.

Frá hálvum juni til hálvan august er garðurin opin fyri vanligum ferðafólki, sum vil gista ella liggja í tjaldi uttan fyri og so brúka teir møguleikar, sum vallaraheimið hevur.

Og teir møguleikarnir eru góðir, kann sannast, tá vit fara at hyggja at húsinum.

Her er alt, sum eitt slíkt stað krevur. Góðir møguleikar at sova. Uppihaldsrúm við sjónvarpi. Telefon, sólstova, góðir felags køkar og baðirúm. Bæði felags og eisini inni á summum av sovirúmunum.

Tú kennir teg mestsum vera komnar til eitt gistingarhús onkunstaðni suðuri í Alpunum, tá tú stendur uttan fyri Gjáargarð. Hendan stóra bygningin við høgu reisingini og trimum svalum á endanum. Allir við útskornum stakitti, sum minna nágreiniliga um tað, ein sær suðuri í Miðeuropa.

Eisini inni í móttøku er sera hugnaligt. Alt er gjørt úr træi, og fram við vegginum eru koyggjur, har tann vitjandi kann legjga seg í og draga fyri. Dupultar, so tvey fólk húsast í hvørjari.

Aðrastaðni í húsinum eru sovisalur og -rúm, har upp til fýra fólk kunnu gista inni. Fleiri teirra við egnum baðirúmi.

Umframt eru tveir køkar við øllum tí, einum køki hoyrir til í dag, sum komfýri við ovni, mikrobylgjuovni og kaffimaskinu, har gestirnir sjálvir kunnu matgera.

Borðreitt verður við vanligum morgunmati, ið fæst á slíkum støðum, sum tey vitjandi kunnu keypa, eins og okkurt føroyskt eisini fæst undir tonnina. Onkrar vanligar kioskvørur eru at fáa. Og so eru tað pannikøkurnar, sum Gjáargarður við tíðini er kendur fyri.

– Tað kemur fólk framvið soleiðis bara fyir at keypa sær kaffi og pannikøkur, greiðir Lis Jørgensen frá. Men vit hava ikki heitan mat annars, sum onkur hevur fingið fatan av, sigur hon.

Umfram tá morgunmatur er hvønn morgun, er opið dagliga frá á middegi til kokkan átta á kvøldi uttan leygardag, tá stongt er, eftir at fólk hava fingið morgunmat.

## Vitja náttúruna

Eingin ivi er um, greiðir Lis Jørgensen, leiðari á Gjáargarði frá, at tey, sum koma til Gjáar at vitja, vilja síggja vøkru náttúruna her norðuri.

Vanligt er, sigur hon, at fólk koma at fáa sær morgunmat, og fara síðan út at hyggja seg um. Tá klokkan er um tíggju fyrrapart, er stilt í grannalagnum. Tá er einki fólk at síggja. Ikki fyrr nakað væl út á seinnapartin plaga tey at koma aftur.

Men tá hava tey eisini havt møguleikar at síggja ymiskt, sum býarfólk niðri í Europa ikki hava dagliga atgongd til.

Út á Nasa fara tey flestu, og síggja har fuglin, sum heldur til undir Ovara Nasa. Í ár er eingin lundi at síggja har, siga tey frá við Gjógv. Men undanfarin ár hava nakrir verið, og hava teir stuttleika ferðafólki væl.

Eisini er trappugrótið at síggja í gamla gosopinum har úti, og er tað lætt at fylgja báðu megin Gjónna.

Men túrin út á Ovara Nasa gera eisini tey flestu og halda so fram niðan við hegninum niðan eftir egg-ini, har frítt útsýni er til havs og niður í bergið undir teimum. Havhestarnir smúgva tætt fram við egg-ini, og roykurin av teimum stendur ramur í næsarnar á tí vitjandi.

Ambadal vitja eisini nógv teirra, sum koma til Gjáar. Hesin stóri dalurin við tí eina steininum, Festirsteini, sum bara liggur har víðopin og bíðar teimum og bjóðar oman at síggja Búgvan og tað sjáldsama vakra útsýnið vestur yvir, har bæði Risin, Kellingin, Tjørnuvíksstakkur og Skeiðið síggjast. Ein avbera stórbær og hugtakandi sjón.

Beint undir tær liggur Búgvin við sínum fuglalívi. Hósst onkuntíð hevur verið meira, enn tað er í dag, er tað kortini hugtakandi at hoyra gangin av tí, sum hóast alt er har.

Og so skúgvarnir á miðum dalinum, sum leika í og skjóta seg niður yvir hesar ófriðakropparnar, sum koma malandi at órógva pisuna, teir júst hava klakt, og sum til fánýtis roynir at fjala seg í grasinum.

Men summarið fer einaferð at halla, tá fremmandu ferðafólkini fara heim aftur, og Gjáargarður steingir aftur.

Tó tá fara føroyingar at taka til sín og vitja Gjáargarð til at hava skeið ella aðra sosiala samveru, sum altíð er opið fyri.

Tað er bara at taka telefonina og boða frá, sigur Lis Jørgensen, sum tó sjálv, tá summarið er av á hesum sinni, saman við teimum trimum starvsfólkunum hon hevur aftur at sær í summar, fer aftur til Danmarkar, haðani tey eru ættað.



*Ferðafólkið, sum kemur til Gjáar, fær nógvar góðar náttúruupplivingar, tá tey fara á sínar gongutúrar. Ein vanligur túrur er á Ambadal, har millum annað sæst niður á Búgvan*
*Mynd: Edvard Joensen*



*Lis Jørgensen, uttast h.m., saman við hinum timum starvsfólkunum, sum eru á Gjáargarði í summar*
*Mynd. Edvard Joensen*



# Tað er ferðin ið drepur

**– Vit kunnu ongantíð góðtaka, at fólk skulu doyggja í ferðsluni, sigur Jan Fossaberg, ferðslupolitistur í Havn, sum hevur roynt at tosa við ungar menn, ið koyra skilaleyst. Hann hevur eisini tosað við menn, sum seinni eru deyðir av skilaleysari koyring, og menn, sum seinni hava dripið fólk av skilaleysari koyring**

FERÐSLUDEYÐI
*Eirikur Lindenskov*



*Jan Fossaberg, ferðslupolitistur í Havn, er ikki í iva um, at tað er ferðin, sum er størsti trupulleikin í ferðsluni. Tað eru serliga ungir menn, ið koyra skilaleyst, og summir teirra gevast ikki við hesum, hóast løgreglan bæði hevur roynt at tosa við teir og foreldur teirra. Onkur teirra hevur koyrt seg sjálvan í deyðan, onkur hevur koyrt onnur í deyðan…*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

– Ferðin er størsti trupulleikin í ferðsluni.

Hesa skjótu og greiðu niðurstøðu ger Jan Fossaberg, ferðslupolitistur í Havn, tá vit hitta hann á politistøðini í Havn mánadagin seinnapartin.

Síðani 1993 hevur hann havt fingurin á pulsinum, hvat ferðsluni í Føroyum viðvíkur, og hann hevur rættuliga gott innlit í, hvussu vilt tað mangan gongur fyri seg.

Tá stórar og syndarligar ferðsluvanlukkur henda, er vanliga alt á gosi, og tá verður tosað um, hvørji tiltøk eiga at verða sett í verk, men tá ein tíð er fráliðin, tá er alt við tað gamla aftur.

Ofta hevur verið at hoyrt um ungar menn, sum koyra rally ella kappkoyra á alfara veg – ofta við syndarligum avleiðingum, við deyða og líðingum sum fylgju.

– Vit hoyra alt ov lítið um allar tær syndarligu lagnur, sum stava frá ferðsluvanlukkunum. Hetta verður í alt ov stóran mun tagt burtur, og tað er spell, tí tað kundi fingið fólk at skilt álvarsemið í ferðsluni, heldur Jan Fossaberg.

## Tosa við foreldrini

Tað er serliga tann yngsti aldursbólkurin, sum er størsti ferðslusyndarin, og tað eru teir ungu menninir, 18–24 ár, ið sambært hagtølunum eru teir ringastu.

Ofta eru tað teir somu, sum ganga aftur, og fyri at gera eina roynd at fáa bilbukt við ørskapinum, so hava ferðslupolitistarnir roynt at tosa við ungu menninar – og í summum førum við foreldur teirra fyri at vita, um tað hjálpir. Eisini hava teir tosað við foreldur hjá ungum gentum, sum sita í bilunum hjá hesum ungu monnunum fyri at vita, um foreldrini ikki kunnu tosa tær frá at fara í hesar bilarnar.

Hugvekjandi er tað eisini, tá Jan Fossaberg sigur okkum, at onkrir av hesum ungu monnunum, hann hevur roynt at tosa til rættis, seinni eru deyðir – hava koyrt seg sjálvan í deyðan, meðan aðrir hava verið verið fyri teirri vanlagnu, at teir hava dripið onnur fólk – orsakað av skilaleysari koyring

## Skilaleys ferð

– Tað er rallykoyringin hjá ungu monnunum, sum er stóri trupulleikin. Vita vita um, at menn hava koyrt yvir 250 km/t við bili, og tað er jú púra ørt, tá hugsað verður um longu steðgitíðina upp á út við 400 metrar, sigur Jan Fossaberg. Hann sigur eisini, at teir vita um vaksnar menn, sum koyra rættuliga skjótt á motorsúkklu.

– Vit vita um súkklur, sum kunnu koyra upp móti 300 km/t, og at menn hava roynt hetta m. a. í Kollfjarðartunlinum, sigur Jan Fossaberg, sum vísir á, at steðgitíðin hjá eini motorsúkklu við eini ferð upp á 300 km/t er langt oman fyri 900 metrar. T. v. s., at ein súkkla, sum er komin upp í so nógva ferð í tunnlinum, ongan møguleika hevur at steðga aftur, fyrr enn hon er langt uttan fyri tunnilin. Tað í sær sjálvum sigur nakað um ørskapin, tí hvussu skalt tú tá kunna síggja møguligar vandar fyri framman, spyr Jan Fossaberg.

## Vandamikil leikur

Løgreglan fylgir sjálvandi væl við hesum vandamikla leiki, ið summir ungir menn hava fyri. Eitt dømi er »spæl«, sum ungfólk hava fyri í Kollfjarðartunlinum: Meðan nøkur fólk standa á stóra møtiplássinum inni í bergholinum, royna onnur í bili at vita, hvussu skjótt tey fáa bilin at koyra, og í tí tey passera møtiplássið, skulu tey vita, hvussu skjótt tey fáa bilin at steðga.

– Hetta er sera vandamikil leikur, ið kann hava miklan skaða sum fylgju sigur Jan Fossaberg, sum eisini vísir á, at tey ungu finna sær ávís øki, har tey royna at gera sær dælt við nógvari ferð. Eitt av hesum »nýggjaru« økinum er nýggi vegurin til Gomlu Rætt oman fyri Velbastað. Annað strekki er Eiðisvegurin. Løgreglan í Havn veit eisini frá einum ferðafólki, sum hevur sitið í einum bili, sum hevur koyrt 230 km/t á vegnum fram við Norðasta Horni í Havn, og um, at ungfólk eisini eru farin at vedda um kappkoyring.

Gamansleikur, kunnu tey ungu halda, men hetta førir fyrr ella seinni til tann vissa deyða…!

## Fleiri treytaðar frádømingar

Ferðslupolitiið ger sjálvandi regluligar ferðkanningar, og t. d. mikudagin í síðstu viku tóku teir sjey bilførarar, sum fáa frádømt koyrikortið treytað, tí teir koyrdu yvir 30 km/t ella meira oman fyri hægst loyvdu ferð. Hevði tað verið eftir gomlu ferðslulógini, so mistu teir koyrikortið, men nýggja ferðslulógin er eitt sindur linari, tí nú fært tú í veruleikanum eina ávaring fyrstu ferð tú verður tikin: Tú skalt upp til nýggja koyriroynd, og klárar tú tað, so skalt tú einki lógarbrot gera næstu trý árini.

Jan Fossaberg staðfestir, at hetta er ein broyting, sum í fyrsta umfari gevur fólki eina ávaring.

– Tey fáa nú ein eyka møguleika, og nógv brúka tann møguleikan, sigur hann.

– Í miðal verður ein persónur tikin um dagin, sum fær treytaða frádøming av koyrikortinum, sigur hann, og er hetta ein vøkstur í mun til, hvussu nógv mistu koyrikortið eftir gomlu skipanini fyri at koyra ov skjótt.

Jan Fossaberg hevur – eins og øll onnur – onga patentloysn upp á, hvussu vit basa hesum álvarsama heilsu- ella vælferðar trupulleika, sum ferðsludrápini eru vorðin.

– Men vit kunnu ongantíð góðtaka, at fólk skulu doyggja, sigur hann, samstundis sum hann staðfestir, at siðbundna koyrifrálæran ikki gevur fólki nóg hollan kunnleika til ferð og ferðslu.



*– Vit hoyra alt ov lítið um allar tær syndarligu lagnur, sum stava frá ferðsluvanlukkunum. Hetta verður í alt ov stóran mun tagt burtur, og tað er spell, tí tað kundi fingið fólk at skilt álvarsemið í ferðsluni, heldur Jan Fossaberg*
*Savnsmynd*